

Spildurnýggi Thor Magni ávegis til arbeiðis í Norðsjónum.

# Thor Magni ávegis úr Turkalandi til arbeiðis í Norðsjónum

**Jan Müller**

01.03.2015 - 19:51

Oljan.fo

*Tað gongur væl hjá nýggjasta farinum í Thor-flotanum, Thor Magni, tí fyrsta av fýra spildurnýggjum seismikk-hjálparskipum, nú skipið er ávegis av skipasmiðjuni Besiktas í Turkalandi til Bergen. Á leiðini norður skal skipið inn til Ijmuiden í Hálandi at bunkra. Tað skal so arbeiða út frá Bergen í einar tveir mánaðir, áðrenn leiðin eftir øllum at døma gongur til Kanada. Umborð eru fimm føroyingar, tríggir filipinar og ein bulgari. Sum skilst hevur alt riggað, sum tað skal á tekniska royndartúrinum, sum varð gjørdur herfyri.*

*Oljan.fo, sum vitjaði í Istanbul, hevur tosað við verkætlanarleiðaran, klaksvíkingin Poul Nolsøe Laksafoss um spennandi arbeiðsuppgávuna. Hann hevur staðið fyri og fylgt*

*arbeiðinum á skipasmiðjuni í Istanbul nú í tvey ár og fer at vera har hetta triðja og seinasta árið eisini at fylgja við hinum trimum skipunum, sum eru í gerð. Tað næsta skipið, Thor Modi, verður liðugt í mai. Lesið samrøðuna í komandi grein á oljuportalinum.*